## Nýggj fiskiveiðiavtalu millum Føroyar og Russland

Í vikuni vóru fiskiveiðisamráðingar í St. Pætursborg um nýggja fiskiveiðiavtalu millum Føroyar og Russland fyri 2007.
Í høvuðsheitum gjørdist úrslitið hetta:
Føroysk rættindi í russiskum sjógvi
Toskur 11.000 tons óbroytt
Hýsa 1.340 tons óbroytt
Flatfiskur 900 tons í mun til 1.000 tons fyri árið 2006
Rækjur 1.000 tons í mun til 500 tons fyri árið 2006
Russisk rættindi í føroyskum sjógvi
Svartkjaftur 140.000 tons í mun til 160.000 tons fyri árið 2006
Makrelur 8.200 tons í mun til 7.000 tons fyri árið 2006
Føroyskur samráðingarleiðari var Andras Kristiansen, deildarstjóri í Fiskimálaráðnum, sigur Fiskimálaráðið á heimasíðuni hjá ráðnum.

**rd.**

# Tey ungu síggja møgu-leikar í altjóðagerðini

**- Sambandsflokkurin vil ikki avreiða nakað til ES fyri einki. ES fær ikki ein upsa frá okkum uttan so, at vit fáa fullan valuta fyri hann. So einfalt er tað, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins, sum kortini heldur, at føroyingar eiga at finna út av, hvørjir fyrimunirnir og vans-arnir við nærri tilknýti til ES – ella møguligum limaskapi - eru**



*– Nei, úrslitið um føroyskan limaskap í ES undrar meg ikki og soleiðis, sum heimurin uttan um okkum er samansettur í dag, er eitt slíkt úrslit væntandi. Eg trúgvi, at tað serliga er yngra ættarliðið, sum kennir seg tættari knýtt at Evropa, sigur Kaj Leo Johannesen*

FØROYAR OG ES
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Formaðurin í Sambandsflokkinum, Kaj Leo Johannesen, er ikki so ovfarin av úrslitinum í spurnarkanningini hjá Fynd um føroyskan limaskap í ES.

Kanningin vísti nevniliga, at 40% av teimum, sum svaraðu ja ella nei fyri ella ímóti limaskapi, søgdu seg vera fyri, at Føroyar verða umfataðar av limaskapi í ES, meðan 36,5 søgdu nei.

Spurningurin, sum Fynd setti, var stuttur og einfaldur: Skulu Føroyar umfatast av limaskapi í ES?

Eins og vit vístu á í blaðnum í gjár, eru rættiliga nógvir føroyingar í iva, nevniliga út við ein fjórðingur av teimum spurdu.

Men Kaj Leo Johannesen er ikki í iva um, at spurnarkanningin gevur eina ábending um, hvønn veg tað ber í fólkinum – og serliga hjá tí yngra ættarliðnum.

### Partur av Evropa

– Nei, úrslitið undrar meg ikki og soleiðis, sum heimurin uttan um okkum, er samansettur í dag, er eitt slíkt úrslit væntandi.

Hann vísir á, at antin vit vilja tað ella ikki, eru vit partur av Evropa, og hann ivast onga løtu í, at tað serliga er yngra ættarliðið við teimum møguleikum, sum hesi hava, ið kennir seg tættari knýtt til Evropa

– Góðu samskiftismøguleikarnir við alnótini og møguleikarnir fyri útbúgvingum um landamørk, gera, at yngra ættarliðið hyggur út um bøgarðarnar. Eg trúgvi, at hesi betur skilja tann týdning, sum niðurbrótingin av landamørkunum merkir, og hvønn týdning hetta hevur fyri eitt nú búskap og útbúgving.

Kaj Leo sigur, at á landsfundi Sambandsfloksins seinasta fekst fyri fyrstu ferð felt í landsfundarsamtyktina, at Føroyar eiga at kanna, hvørjir fyrimunirnir og vansarnir eru við einum nærri tilknýti til ES.

### Altjóðagerðin

– Vit siga ikki, at vit skulu fara upp í ES, um vansarnir eru størri enn fyrimunirnir, men vit eiga at kanna hesar møguleikar.

Formaður Sambandsfloksins vísir á, at tað er ES, ið rindar okkara "rokningar", sum hann tekur til.

Í hesum sambandi vísir hann á, at eini 90-95% av okkara útflutningi fer til londini í ES.

– Skulu vit skapa vælferð í Føroyum, so fólk kunnu hava tað gott, mugu vit í størri mun taka lut í altjóðagerðini, sum er ein veruleiki, og hetta kunnu vit ikki bara gera í orðum, men eisini í gerðum.

Kaj Leo sigur, at hann persónliga ikki kann siga, um hann er fyri ella ímóti føroyskum limaskapi í ES, fyrr enn hann kennur treytirnar til fulnar – bæði tær, sum tala fyri og tær, sum tala ímóti.

– Tað eru hesi viðurskifti, vit mugu finna út av, og so mugu vit síggja, um tey eru nóg "lokkandi" fyri okkum ella ikki.

### Taka fyrivarni

Hann vísir á, at tað serliga er á fiskivinnuøkinum, at føroyingar hava verið skeptiskir fyri møguligum ES-limaskapi.

– Vit mugu fáa at vita, hvør javnvágin verður, og kanska fáa vit, tá ið saman um kemur, størri kvotur enn tær, vit noyðast at lata. Tað vita vit ikki, fyrr enn samráðingar hava verið um hesi og mong onnur viðurskifti, leggur hann aftrat.

Formaður Sambandsfloksins vísir til viðurskiftini hjá Álandi við ES, har Áland hevur ein sonevndan at-limaskap, ið hann rópar tað.

– Í sínum viðurskiftum við ES, verður hædd tikin fyri nøkrum ávísum áhugamálum, ið hava serliga stóran týdning fyri Áland, eitt nú ferðavinnuni. Á slíkum økjum vilja álendingar sjálvir ráða og sita við avgerðarrættinum, sigur hann.

### Danir við

Kaj Leo heldur, at vit føroyingar í størri mun enn higartil áttu at tikið danir við sum samstarvspart í komandi samráðingum við ES, tí Danmark frammanundan er limur í samveldinum.

– Eg haldi, at vit soleiðis áttu at "trekt" upp á donsku vitanina, leggur hann aftrat.

At enda slær Kaj Leo Johannesen fast, at Sambandsflokkurin fer ikki at avreiða nakað til ES fyri einki.

– ES fær ikki ein upsa frá okkum uttan so, at vit fáa fullan valuta fyri hann. So einfalt er tað, sigur formaður Sambandsfloksins.

